# Átti at verið øvugt

**Formaðurin í Sjúklingafelagnum heldur, at tað skuldi heldur verið so, at peningur varð fluttur til meira sjúklinga-ráðgeving á Ríkissjúkrahúsinum, enn til fleiri normeringar á Hotel Tórshavn**

SJÚKLINGA-RÁÐGEVING
*Edvard Joensen*


*Tað er heilt burturvið at skerja sjúklingaráðgevingina á Ríkissjúkrahúsinum, heldur formaðurin í Sjúklingafelagnum*

Tað er heilt burturvið at skerja sjúklingaráðgevingina á Ríkissjúkrahúsinum, sigur John Eysturoy, formaður í Sjúklingafelagnum. Tað átti heldur at verið hinvegin, at fleiri pengar vórðu nýttir til ta tænastuna. Sjálvt um tað skuldi kostað eitt sindur inni á Hotel Tórshavn.

Ikki so, at hann heldur, at Hotel Tórshavn á nakran hátt skal skerjast, leggur John Eysturoy dent á. Men hann heldur so sanniliga heldur ikki, at sjúklingaráðgevingin skal tað. Og at brúk bara skal vera fyri seks tímum um vikuna til ráðgeving, heldur hann vera burturvið.

Hann ivast ikki í, at fyri sjúklingin er skipanin við ráðgeving inni á sjúkrahúsinum burturav, nógv betri skipan enn tann gamla, sum var, og sum nú verður tosað um at fara yvir aftur til. Og hansara meting er greitt tann, at her er talan um sparingar, sum so koma at raka sjúklingin har, sum hann annars mest treingir til at hava stuðul, sigur John Eysturoy.

# Vardi verkstaðurin nærkast

**Tað gongur eftir ætlan við varda verkstaðnum, sum Sørvágs Kommuna byggir. Ætlandi verður latið upp umleið 1. mars**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*


*Tað er Sørvágs Kommuna, sum einsamøll stendur fyri bygginini av nýggja varda verkstaðnum í Vágum, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági*

Sørvágs Kommuna byggir vardan verkstað, sum ætlandi kann takast í brúk umleið 1. mars. Verkstaðurin er ætlaður brúkarum úr allari oynni.

Málið um vardan verkstað í Sørvági er ikki heilt nýtt. Tað er frá tíðini, tá Petur Kruse var borgastjóri í Sørvági og hevur verið ført víðari í tí anda, hann ætlaði tað, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági.

Hann greiðir frá, at timburarbeiðið nú er liðugt, og at tilboð upp á málaraarbeiðið fara at verða innheintað fyrsta dagin. Og gongur so sum ætlað, kunnu fyrstu fólkini fara til arbeiðis har um ein góðan mánað.

Hvussu nógv fólk talan verður um alt í alt, dugir borgarstjórin í Sørvági ikki at siga, sum er. Men tey eru nøkur um alla oynna.

Í løtuni er tilboð til teirra í Sørvágs skúla. Men tað eru ymsir trupulleikar heftir at tí tilboðnum. Eitt nú, at talan er um avmarkaðar tíðir, sum ikki altíð passa øllum brúkarum líka væl. Tískil er líkt til, at ikki øll, sum annars ynskiligt kundi verið, gera brúk av hesum tilboðnum.

Tað metir borgarstjórin fer at verða heilt øðrvísi, tá nýggi verkstaðurin verður latin upp og fer at hava opið allan dagin.

Av øðrum verkætlanum í Sørvági í løtuni nevnir borgarstjórin fiskamóttøkuna, sum arbeitt verður við at flyta úr verandi hølum í størri høli á havnarlagnum, har sum timburhandilin fyrr helt til.

Hendan flytingin er helst einar fjúrtan dagar ella so seinkað, sigur Eivin Jacobsen, sum tó væntar at einaferð seinast í februar fer móttøkan at lata upp í nýggju hølunum.

# Gamlir vinir hittast aftur

**Danski spælimansbólkurin »Gamle venner« koma fjórða árið á rað til Føroya at vitja og spæla í summar. Serlig vinabond eru knýtt til Tjørnuvíkar**

VITJAN
*Edvard Joensen*


*Serlig vinabond eru knýtt milum Tjørnuvík og spælimansbólkin »Gamle venner«*

Gamle venner eru aftur farnir at fyrireika eina Føroyaferð. Hetta verður fjórða árið á rað, at danska spælimansorkestrið vitjar í Føroyum.

Á sumri 2001 kom danski spælimansbólkurin »Gamle venner« til Føroya, her tey spældu á sambýlum, ellisheimum og øðrum støðum, har eldri fólk búðu ella hittust. Vitjanin eydnaðist so væl, og móttøkan var so góð, at gjørt varð av at koma aftur árið eftir.

Og væl man hava hilnast, tí nú koma tey aftur fyri fjórðu ferð. Avtalur um at spæla ymsastaðni í Føroyum eru longu gjørdar, siga tey í tíðindaskrivi, sum kom um dagarnar.

Bólkurin er úr Ølsted beint uttan fyri Århus, og plagar vanliga at spæla á einum pensionistcentrið í einum av grannabýunum.

Tey spæla allan vanligan spælimanstónleik, eins og annað, ið serliga eldri fólki dámar. Eisini er vanligt, at tey taka nøkur dansiløg, sum teimum eldru plagar at dáma væl. Og rættiliga vanligt er, at tey fara upp á gólv, tá gomlu vinirnir vitja.

Donsku spælimenninir hava á vitjanum teirra búð í Tjørnuvík, har teimum hevur dámt rættiliga væl og eisini hava knýtt vinabond.

Í fjør vóru tjørnuvíkingar í Danmark og sungu Kingo í samband við 300 ára haldið fyri deyða Thomas Kingo's, og tá vóru »Gamle Venner« millum annað við í fyrireikinunum til onkur av tiltøkunum í Danmark.



# Ringu útlitini eru ein stór avbjóðing

**– Nú skulu vit vísa, at vit veruliga eru politikkarar. Orðini eigur samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard, sum ásannar, at búskaparligu útlitini eru munandi verri í ár enn undanfarin ár. Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava avgreitt ríkisrættarligu viðurskiftini, vinnumál og fíggjarmál**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*


*Samráðingarnar um ríkisrættarligu viðurskiftini, vinnupolitikkin og fíggjarpolitikkin hava gingið so mikið væl, at samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard, metir, at málini nú eru avgreidd*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eitt løgtingsval í úrtíð kann eftir øllum at døma flyta fjøll. Undir valstríðnum nýttu flokkar høvið til at breggja sær av, at búskaparstøðan í føroyska samfelagnum var góð, hóast niðurgongd var at hóma. Nú tykist vent í holuni.

Fíggjarmálastýrið gjørdi seinasta fríggjadagin eina meting búskaparligu støðuni og kom fram til, at inntøkumetingarnar eru 200 mio. lægri enn fíggjarlógin hjá farnu samgongu boðaði frá.

Í Sosialinum í dag hevur formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, eina viðmerking til inntøkumetingarnar hjá Fíggjarmálastýrinum. Hann rør framm undir, at tey tøl, sum eru komin í ljósmála, hava ikki hald í veruleikanum.

Meðan Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin í løtuni bíða eftir samráðingarboðum, hava Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin umrøtt fíggjar- og búskaparmál á Gamla Apoteki.

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava eina øðrvísi fatan av búskaparligu støðuni enn formaður Tjóðveldisfloksins. Undir samgongusamráðingunum hevur versandi búskaparliga støðan verið nógv umrødd.

## Lættari í 1998

– Tað var ólíka lættari í 1998, tá útlitini vóru bjørt. Útlitini nú eru munandi verri, men eg havi roynt tað áður (Jóannes var landsstýrismaður í fíggjarmálum frá 1990, blðm.). Vit kunnu eftir øllum at døma vænta eitt hall á góðar 300 mio. og tað er ein stór avbjóðing. Nú skulu vit vísa, at vit veruliga eru politikkarar, sigur Jóannes Eidesgaard

Hann heldur tað er av stórum týdningi, at ein komandi samgongu setur sær fyri at skapa neyðugu optimismuna, sum hann málber seg. Hetta skal gerast við einum væl skipaðum vinnupolitikki sum skal verða við til at økja um inntøkurnar og harvið skapa ein fíggjarligan vøkstur.

## Komið undir land

Samráðingarnar um ríkisrættarligu viðurskiftini, vinnupolitikkin og fíggjarpolitikkin hava gingið so mikið væl, at Jóannes Eidesgaard metir, at málini eru avgreidd.

Undan samráðingunum vóru hesi trý mál nevnd um tey tungu økini í samráðingunum. Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava eftir øllum at døma funnið eina felags semju um hesi øki og tí eru útlitini fyri eini ABC samgongu munandi styrkt.

Samráðingarleiðarin vil framvegis ikki siga, hvørjar semju, teir tríggir flokkarnir hava bundið seg til. Nakað av togtogan var mánakvøldið um skattareformin hjá Sambandsflokkinum, men partarnir funnu kortini eina semju.

Samráðingarnar skuldu halda fram týsmorgunin. Samferðsluøkið var á skránni. Jóannes Eidesgaard væntaði ikki, at nógv tíð fór samferðsluøkinum, tí flestu íløgurnar eru samtyktar. Seinnapartin týsdagin stóðu skúla- og mentanarøkið fyri tørni.

# Krákan fer upp eftir listunum

**Eivør Pálsdóttir og fløga hennara Krákan klára seg væl í Íslandi. Fløgan er farin frá nummar 21 til nummar 3 á íslendska hittlistanum og tað tykist, sum yngru lurtararnir nú eisini vísa áhuga**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Síðani Eivør Pálsdóttir í Íslandi varð heiðrað við heiðurslønum, hevur navn hennara veruliga verið í ljósinum og tað fræettist eisini í Íslandi, hvussu glaðir og stoltir føroyingar eru fyri heiðurin. Nevnd verður m.a. stóra móttøkan í Gøtu.

Í síðstu viku var fløgan Krákan nummar 21 á hittlistanum í Íslandi, men er hesa vikuna nummar 3, og so frammaliga hevur hon ikki verið áður. Bert tær tvær fløgurnar, sum høvdu bestu sølutølini í fjør, seldu fleiri eintøk hesa vikuna.

Talan er um Papar, sum James Olsen einaferð var partur av og so Óskar Pétursson, ið syngur væl dámdar sangir í operakendum stíli.

Og tað tykist, sum er íslendski ungdómurin farin at vísa Eivør áhuga. Ungdómar atkvøða á hittlistanum »Samfés«, ið er á landsumfatandi støðini Rás 2 hvønn mikudag. Listin kann sammetast við okkara 15 tær bestu í Úf.

Hesa vikuna hevur Eivør verið nummar 3 á Samfés listanum við »Við gengum tvø«. Tað løgna er kanska, at vanliga er tað munandi tyngri tónleikur, ið ger seg galdandi í oddinum og sæst tað eisini av, at nummar eitt er System Of A Down og nummar tvey er Audioslave. Men Eivør er nummar 3 og eru lurtarar hennara tískil nú eisini tey 13-15 ára gomlu, har tað áður annars mest vóru tey á hennara egna aldri og eldri, ið lurtaðu eftir Eivør.


*Krákan hjá Eivør hevur høgt flog á íslendsku tónleikatindunum*